ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

8. desember 2020
Mál: 20/00956-2
Viðgjørt: Elin Winther Poulsen

Nr. 051.20

Svar uppá

Fyrispurning nr 051.20 frá Hervør Pálsdóttir, løgtingsmanni, settur landsstýriskvinnuni í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at bøta um umstøðurnar hjá Kvinnuhúsinum at hjálpa kvinnum, ið eru harðskapsraktar?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at hækka játtanina á fíggjarlógini til Kvinnuhúsið?
3.Hevur landsstýrismaðurin ítøkiligar ætlanir um at útvega Kvinnuhúsinum betri hølisviðurskifti við plássi fyri fleiri kvinnum, enn nú?

Svar:

Til nr 1:

Kvinnuhúsið ger eitt megnararbeiði at hjálpa teimum kvinnum, sum venda sær til teirra, tí tær eru ella hava verið fyri harðskapi.
Hetta ásanna vit í samgonguni, og settu okkum tí fyri, alt fyri eitt, tá vit tóku við, at Kvinnuhúsið skuldi fáa hægri játtan.
Á fíggjarlógini 2020 varð stuðulin til Kvinnuhúsið sostatt hækkaður við 400 tús. kr.

Til nr 2:

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2021 verður stuðulin í 2021 óbroyttur t.e. 1.765 tús. Kr.
Leggjast kann afturat, at umframt stuðulin sambært fíggjarlógini, fær Kvinnuhúsið eisini stuðul sambært Heildarætlan um harðskap í parløgum og nærsambondum.
Her er talan um pening til neyðsynjarvørur, til sálarfrøðiliga viðgerð og til tulking.

Til nr 3:

Kvinnuhúsgrunnurin er ein sjálvsognarstovnur, og tað er Kvinnuhúsgrunnurin, sum útvegar pening til rakstur av Kreppumiðstøðini.
Tá talan er um sjálvsognarstovnar, er vanligt, at landið fyrst og fremst stuðlar við rakstrinum.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Almannamálaráðið stuðlar Kreppumiðstøðini og Kvinnuhúsinum. Í fjør var játtanin til Kvinnuhúsið 1.765 tús. krónur.
Eg kann leggja afturat, at í ár eru eisini pengar játtaðir til at fáa til vega hagtøl, sum lýsa hetta økið í síni heild.
Tíverri er framvegis neyðugt støðugt at arbeiða við at basa harðskapi og ágangi, og tí verður eisini áhaldandi arbeitt við at bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum eru fyri harðskapi.
Fáa vit nágreinilig tøl, sum lýsa hetta økið, ber eisini betri til frameftir at leggja arbeiðið til rættis.
Hetta hevði tí eisini komið Kvinnuhúsinum til góðar.

Tórshavn, 9. desember 2020
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýriskvinna